## DAGSINS MEINING

# Kríggj og pengar

Danskir uttanríkisráðharrar hava av og á vitjað í Føroyum. Og nú hevur so tann konservativi Per Stig Møller verið og vitjað partamann sín, løgmann. Tað tykist ikki, sum tey stóru málini hava myndað vitjanina, og ein kann næstan fáa ta fatan, at meginorsøkin til vitjanina er, at Føroyar liggja á vegnum til Grønlands, har uttanríkisrráðharrin hevur aðrar og meira álvarsamar trupulleikar at dragast við. Í Grønlandi eru stóru spurningarnir leikluturin hjá Thule í missilskjøldri USA og uppruddingin í økinum kring Thule og Dundas.

Men eitt gott var so við vitjanini: løgmaðurin, sum var farin mestsum undir heilt, er komin afturíaftur. Eitt mál hevur tó merkt vitjanina, og tað er kríggið í Iraq. Sum kunnugt var løgtingið ímóti krígnum og var sostatt á linju við parlamentini í Noregi, Svøríki, Fraklandi, Týsklandi og mong øðrum londum. Hetta forðar tó ikki Løgmanni, sum var fyri krígnum, at royna at fáa sum mest burtur av herfongi teirra sameindu.

Sum øllum kunnugt hava tey sameindu, harímillum Danmark telist, sorðað partar av Iraq sundur. Alt liggur beinabjølgi: undirstøðukervi, samskiftiskervið, vegir og havnir, skúlar og sjúkrahús, fornminnisøvn, listasøvn, dagstovnar og barnaheim, kirkjur og moskur, ja, stórt sæð alt uttan oljumálaráðið. Hetta skal alt byggjast uppaftur til gagns fyri iraqiska fólkið, sum væl at merkja sjálvt skal rinda fyri endureisingina. Henda endurreising verður goldin av konti hjá iraqiska statinum, sum hava verið stongdar í áravís.

Og løgmaður, sum tann praktiski maður, hann er, sær møguleikarnar fyri føroyskt vinnulív. Tað ræður um at liggja framvið! Har nakað er at vinna, har eru vit við. Føroyskt vinnulív má sleppa at ogna sær lut í herfonginum, hóast tær almennu Føroyar vóru ímóti krígnum. Hetta er tó eingin trupulleiki, vissaði uttanríkisráðharrin okkum um í Breddanum týskvøldið. Soleiðis eru vit heldur ikki, og her verður nóg mikið til allar kappingarførar og framfýsnar fyritøkur við áræði. Smáligt hevur almenna Danmark ongantíð verið! Tað má ásannast!

Kríggj og pengar hava altíð fylgst, so fyri so vítt er hetta einki løgið. Og víst unna vit føroyskum vinnulívi alt gott. Men álvaratos: er hetta kortini ikki í so skjótt og í so smart? Fyri ikki at siga í so grammt? Eiga vit t.v.s. Løgtingið, ikki at seta sum treyt fyri føroyskari luttøku, at ST stendur á odda fyri endurreisingini? Og er tað ikki eitt sindur ómoralskt at vinna pening av hesum virksemi, um ikki eisini onnur enn iraqiska fólkið t.d. USA og Bretland rinda fyri gildið?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Demokrati, tá tað er best

**Sonja F. Mørkøre**

Eg skilji á lesarabrøvunum frá bæði Mikkjali og Gunnbirni, at tit hava tikið mítt lesarabræv ógiliga persónligt. Serliga mín meining um, at tað ikki var vit og skil, sum sum stýrdi penninum, tá nei-krossurin varð settur.

Tað standi eg fast við, og tit hava tykkara fulla rætt til at halda, at mín meining er fullkomiliga hol í høvdið, og at eg stóð longri afturi í køini enn nei-sigararnir. Tað er tað fantastiska við demokratii, nevnliga at bæði eg og tit hava tali- og skrivifrælsi til at geva okkara meining til kennar.

Eg haldi, at tað er av alstórum týdningi, at ein kann siga sína meining. Tað er nógv betur at fólk geva sína meining til kennar, óansæð, hvussu kontant hon er. So kann ein koma víðari. Tað ringasta er, at ein bara tegur alt burtur og ikki fær reinsað luftina.

Hvat viðvíkur samanhaldi í bygdini, so dugi eg ikki at síggja, hví tað er hótt av mínari meining og meiningunum hjá øðrum, sum hava úttalað seg.

Politikkur er eitt og privatlív er eitt annað. Fyri tað um ein heldur at meirlutin av fólkinum hevur tikið eina skeiva avgerð, so merkir tað ikki, at ein ikki kann vera í somu stovu sum hesi fólkini. Eg veit bara, at eg hava latið mína meining koma til kennar, og so er tað tað. So er bara eittans at gera, og tað er at hyggja frammeftir og siga NI ØBB.

Eru tað fleiri, ið kenna seg »persónliga forfylgd« av mínum lesarabrævi og sum ikki duga at taka tað við »et gran salt«, so eru tit vælkomin til at venda tykkum til mín persónliga og fáa luft. Eg veit av egnum royndum, at tað ofta er familjan, sum verður skotin í skógvarnir um meiningarnar hjá øðrum familjulimum. So tað sum eg skrivi er mín fatan aleina og tí ikki nakað, ið mínir familjulimir skulu lastast fyri. So tað er bara at loysa frá tungubandinum. Endaparturin á mær er ikki tann einasti likamsluturin, ið er breiður. Við hesum fari eg at enda mína skriving.

# Øl-viðmerking

**Johan Mortensen**
*Pf Restorffs Bryggjarí*



Eg var sera fegin um tað vælskrivaðu greinina hjá Kim Simonsen »Grátið heldur um spilt øl enn spilta mjólk«, sum stóð í Dimmlætting ígjár. Tað var stuttligt at lesa hansara sera kompetentu viðmerkingar til nógvu ølsløgini, sum høvi var at royna á ølfestivalinum í Valby.

Vit kunnu bert taka undir við Kim og harmast um okkara avoldaðu rúsdrekkalóg, sum er ein bági hjá bryggjaríum, vinnulívi og ferðamannavinnuni. Farcan á fiskivinnustevnuni verður seint gloymd av fremmandamanninum. Sjálvandi eiga føroysku bryggjaríðini at hava loyvi at bryggja øl sterkari enn 5,8%, tað er meira smakkur í einum sterkum øli.

Til gleði fyri Kim Simonsen og allar ølelskandi føroyingar, sum hava eitt normalt forhold til henda sociala mentunnardrykk, skal eg siga frá, at á Vertshúsinum hjá Restorff sum letur upp í næstum, er ætlanin, umframt at hava egnar framleiðslur, eisini at innflyta fleiri útlendsk ølsløg, m. a. Pilsner Urqell, sum Restorff hevur samstarv við. Á Vertshúsinum fer at verða gjørt nógv fyri at stimbra áhugan og kunnleikan um øl. Tað hevur kanska eisini almenna áhuga, at ætlanin er at hava Vertshúsið roykfrítt!

Vit takka Kim fyri hansara positivu orð um okkara Mungát. Vit eru sjálvir errnir av Mungáti og Varginum sum eru liðir í okkara arbeiði fyri at menna føroysku ølmentanina. Eisini eru vit glaðir fyri, at Føroya Bjór luttók á Ølfestivalinum, hetta mennir útlendska áhugan fyri føroyska ølinum, sum er dygdargott og vælsmakkandi handverk, heldur enn útlendska industriølið sum Rúsan innflytir.

# Innbrotið hjá Karsten Hansen

**Heini Dahl**
*Oyndarfjørður*

Arbeiðarafeløgini høvdu eina mynd í bløðunum, av samgongulimum, sum vardu innbrotið hjá Karsten Hansen í Sev sáttmálanum. Handan myndin kemur at hanga á hvørjum húsaveggi til komandi løgtingsval. Hvørjar politiskar fylgjur hon fær veit eg ikki, tað við tíðin vísa. Myndin er ræðandi fyri Maskinmeistarafelagið, myndin er ræðandi fyri Starvsmannafelagið og tey feløg sum samstarva við Fíggjarmálastýrið. Myndin vísir greitt Maskinmeistarafelagnum, at teir eru ov lættin á tí politisku vektini. Tí er limaskapur ella samstarv við Starvsmannafelagið alneyðugt beinanvegin. Felagið eigur ikki at gera annan sáttmála við SEV. Fólkini eiga at fara til hús, blíva tey lønt eftir tí gamla sáttmálanum. Teir smáu stuðulsflokkarnir hjá fólkaflokkinum, kristiligi flokkur og sjálvstýrisflokkurin vóru einastu politisku flokkar, sum høvdu makt og møguleika at stoppa politiskari upp í blanding til sáttmálatrætuna. Innbrotið hjá fíggjarmálastýrinum í SEV sáttmálanum var umbiðið arbeiði frá arbeiðsgevarum. Hetta duga sjálvt búrhøsn at síggja. At Jenis av Rana og Kári Højgaard ikki vilja skilja hetta er harmiligt.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




Heim fyri minnisveik í Vallalíð:

# Byggingin útsett fýra mánaðir

**Í øllum førum fýra mánaðir fara at ganga, áðrenn byggingin í Vallalíð kann halda fram**

BYGGING
*Heri á Rógvi*



*Lagið var gott, tá fyrsta takið varð tikið fyri at fáa bygt ein heim til minnisveik í Vallalíð. Land og kommuna tóku í felag tak fyri at fáa bygt heimið…*

Tey minnisveiku og teirra avvarðandi mugu brynja seg við tolni. Í øllum førum tey, sum ætla sær í heimið fyri minnisveik í Vallalíð.

Hóast framhaldssøgan um helst kendasta byggingina í Føroyum í løtuni nærkast einum enda, so er eitt fitt petti eftir enn.

Tórshavnar býráð samtykti á eyka býráðsfundi týskvøldið at broyta byggisamtyktina fyri A1 økið, ið heimið fyri minnisveik verður bygt í.



*…Men so gjørdu grannarnir vart við sína misnøgd, og endin gjørdist, at byggilendi varð lækkað hálvanannan metur. Ein broyting, sum kostaði skattgjaldarunum yvir eina millión…*

Hetta er síðsta stig í einum drúgvum máli. Upprunaliga var ætlan at byggja eitt heim fyri minnisveik í Vallalíð. Heimið skuldi kostað 16 milliónir at byggja, og landið og Tórshavnar kommuna skuldu býta útreiðslurnar ímillum sín. Og alt byrjaði eisini væl. Báðir partar sannaðu, at stórur tørvur var á einum tílíkum heimi, og fyrsti spakin var settur í av landsstýrismanninum og umboðum fyri kommununa.

Eitt sindur seinni byrjaðu trupulleikarnir.

Fyrst kærdu grannarnir sína neyð. Teir hildu ikki, at byggingin kundi halda fram á økinum. Hetta endaði so fyrst við, at byggilendi varð lækkað, og málið endaði seinni á borðinum hjá Oljumálaráðnum, sum er myndugleiki á økinum.

Lækkanin av byggilendinum fer samanlagt at kosta omanfyri eina millión, væntar Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn.

### Í rættin

Eftir at Oljumálaráðið hevði gjørt eina niðurstøðu í málinum, sum segði, at byggingin ikki var í tráð við byggisamtyktina hjá Tórshavnar kommunu og álegði kommununi at steðga byggingini, endaði málið í Løgmálaráðnum og so aftur í Oljumálaráðnum.

Tórshavnar kommuna vildi ikki steðga byggingina, og Oljumálaráðið legði málið fyri fútarættin, sum álegði fútaforboð.

Men hóast Tórshavnar býráð nú hevur samtykt eina broyting í byggisamtyktini, so er málið ikki loyst av hesi orsøk.

Málið er nevniliga lagt fyri Føroya rætt.

Tað er soleiðis, at skal fútaforboðið framvegis vera galdandi, so má málið fyri Føroya rætt, og hetta hevur Oljumálaráðið so nú gjørt.

Hesum váttar Rókur Tummasarson, fulltrúi í Oljumálaráðnum.

Tá ein tílík broyting í einari byggisamtykt verður gjørd, so skal hendan fyrst lýsast alment og skal hon liggja frammi í tríggjar vikur. Fólk hava tríggjar mánaðir – íroknað tær tríggjar vikurnar – at lata býráðnum viðmerkingar til málið.

Síðani fer málið niðan til Oljumálaráðið til góðkenningar, har ein býarplansnevnd skal taka støðu til málið.

Rókur Tummasarson sigur, at nevndin er mannað við umboðum fyri Tórshavnar kommunu og Føroya kommunufelag og nøkur umboð fyri landið. Hann dugir ikki at siga nakað um, hvørt tað er sannlíkt, at broytingarnar verða góðkendar.

Hetta ger alt saman, at byggingin í Vallalíð er steðgað í øllum førum í fýra mánaðir. Jan Christiansen roknar við, at tað í besta føri verða talan um fýra mánaðir, men roknast kann við fimm, og tað er summarið eisini væl og virðiliga farið.

### Stórur tørvur

Borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen, heldur tað vera stórt spell, at málið er komið hertil.

– Tørvurin er stórur eftir einum tílíkum heimi, og vit halda tað vera stórt spell, um hetta nú skal draga út enn longur, sigur Jan Christiansen.

Hann sigur, at meirilutin í býráðnum ynskti ikki at draga málið longur út, og byggisamtyktirnar vóru tískil samtyktar.

Hann sigur seg eisini harmast um, at tað ikki hevur eydnast at finna eina betri loysn.

Longda byggitíðin fer at kosta Tórshavnar kommunu pengar, men borgarstjórin veit ikki í skrivandi stund hvussu nógv.

Hann avvísir als ikki, at kommunan fer at reisa endurgjaldskrav móti Oljumálaráðnum, um tað skuldi komið so langt.

Annars atkvøddu limirnir hjá Tjóðveldisflokkinum í Tórshavnar býráð ímóti broytingunum í byggisamtyktini.

### Hvat er eitt rúm?

Sum tað sæst aðrastaðni á síðuni, so snýr broytingin í byggisamtyktini seg um eina orðing. Tað er serliga týdningurin av orðinum rúm, ið skilir Oljumálaráðið og Tórshavnar kommunu.

Oljumálaráðið heldur, at hetta er eitt rúm, t.e. eitt rúm í einum húsum. Tórshavnar kommuna heldur hinvegin, at talan er um at geva rúm, t.e. á økinum verður pláss fyri.

## Fakta

Broytingarnar, sum Tórshavnar býráð samtyki týskvøldið, eru gjørdar í grein 5 stykki 1 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn – Ásetingar fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði. Broytingarnar eru soljóðandi:

*Frá*
Loyvt er einans at byggja stakhús við í mesta lagi tveimum íbúðum og - eftir serloyvi frábyggivaldinum - tvíhús, raðhús og ketuhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.

Í samband við búðstaðirnar skal tó bera til at gera rúm til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur.

*Til*
Loyvt er einans at byggja stakhús við í mesta lagi tveimum íbúðum og - eftir serloyvi frábyggivaldinum - tvíhús, raðhús og ketuhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.

Í sambandi við búðstaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til at byggjast kunnu handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur.



*…og so kom Oljumálaráðið upp í málið, og byggingin er nú latin Føroya rætti at taka støðu til*

# 50.000 kr. til Irak

**Er stuðulin føroyski landskassin hevur latið til Irak, nú føroyskir myndugleikar ynskja føroyska luttøku í endurbyggingini av Irak**

HJÀLP
*Heri á Rógvi*

Føroyskar fyritøkur skulu vera við til at endurbyggja Irak.

Hetta var størsta frámerki við vitjanini hjá Per Stig Møller, uttanríkisráðharra, fyrr í vikuni.

Eftir føroyskum ynski var hetta mál á skránni, tá Per Stig Møller hitti løgmann, og uttanríkisráðharrin tók fult undir við ynskinum, og hann segði seg vilja gera sítt fyri, at hetta kundi koma í lag.

Tosað verður ofta um at knýta menninghjálp. Men ikki tann nógva menningarhjálpin er komin úr Føroyum til Irak.

Málið hevur verið fyri í løgtinginum. Av játtanini til menningarhjálp fyri 2003 eru 50.000 krónur brúktar til Irak. Løgmaður ætlaði eisini at fáa játtað 2,8 milliónir afturat – eins og gjørt varð í Afganistan.

Málið var fyri á fíggjarnevndarfundi 30. apríl.

– Ein samd nevnd tók ikki undir við uppskotinum vísandi til, at mett verður ikki, at málið hevur skund, og at málið kann leggjast fyri Løgtingið í næstu tingsetu, stendur at lesa á heimasíðuni hjá Føroya løgtingi.

Sostatt hava føroyingar áhuga fyri at byggja upp, men menningarhjálpin úr løgtinginum letur bíða eftir sær.